# Søkt verður eftir fólki

**til Gardin/Botex deild okkara, at byrja skjótast gjørligt.**

Starvið er hálvttíðarstarv, og verður lønt sambært avtalu.

Starvið fevnir um, kundatænastu, innkeyp, mát av gardinum v.m..

Førleikakrøv eru, at tú ert m.a. fyrikomandi, kundavinarligur og hevur gott hugflog.

Um hetta hevur tín áhuga og meira ynskist at vita, ber til at ringja til Profa Farvur, Eyðun, tlf. 319220 – 519220.

***Umsókn verður at senda til:***

***Profa Farvur, Staravegur 5,***
***Box 3137, 110 Tórshavn.***

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2006.

profa FARVUR botex®

**v/Eyðun Mouritsen · Staravegur 5 · Tórshavn**
**Tlf. 31 92 20 · profa.a.halsi@kallnet.fo**



SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of
*KPMG* International
a Swiss Cooperation

Starvslýsing

# Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara í Kollafirði verður søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði.

Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv, sum í fyrsta umfari er tíðaravmarkað til eitt ár.

**Umsøkjarin**
Tann, sum settur verður, skal hava kunnleika til bókhald, kunna arbeiða sjálvstøðugt og annars verða fyrikomandi.

Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision er ein fyrimunur, men eingin treyt.

Lønin verður sett eftir avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 31. mars 2006.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Bjarna Rasmussen ella Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

SPEKT statsaut.
revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM85





# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN

## LEIÐSLUMENNING
### Útbúgving - 2006

**Diplomleiðaraútbúgving, hold 5**
320 tímar, byrjar 3. apríl 2006 kl. 09.00-16.00

**Hví brúka dýrabara tíð til hugsaðar støður og trupulleikar, tá tú ístaðin kanst brúka tín egna arbeiðsdag sum case?**
Á diplomleiðaraútbúgvingini fært tú ikki bert lærdóm inn í høvdið. Okkara grundregla er, at tú samstundis tekur støðu til nýggju vitanina og síðani brúkar hana á arbeiðsplássinum, har tú dagliga starvast sum leiðari. Við øðrum orðum: Diplomleiðarar sleppa í lestrartíðini at broyta teori til praksis.

Útbúgvingin verður roknað sum ein góð barlast hjá leiðarum serliga teimum, sum hava arbeitt við leiðslu, men enn ikki hava nomið sær eina útbúgving innan starvsfólkaleiðslu.
**Tilmelding: áðrenn 29. mars 2006**

**Grundleggjandi leiðaraútbúgving hold 7**
**96 tímar 8; 9; 10. mai 8; 9; 22; 23. juni 30; 31; aug. 1. sept - 2; 3. okt. kl. 09.00-16.00**
Útbúgvingin vendir sær til nýggjar og komandi leiðarar. Vilt tú hava eitt størri leiðslufakligt støði, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Royndir leiðarar, sum hava fingið nýggjar arbeiðs- og leiðslufunktiónir kunnu eisini taka hesa útbúgving.
**Tilmelding: áðrenn 24. apríl 2006**

**Grundleggjandi leiðaraútbúgving hold 8**
**96 tímar 13; 14; 15. nov. 4; 5. des. og í 2007: 11; 12. jan. 20; 21; 22. feb. 11; 12. mars**
**Tilmelding: áðrenn 30. oktober 2006**

**Coaching hold 3**
**24 tímar 1; 2. mai - 12. juni kl. 09.00-16.00**
Seinastu árini er vorðið alt greiðari, hvussu umráðandi tað er, at leiðarin kennir coach-amboðini.
Við tí professionellu samrøðuni sum amboð lærir leiðarin at arbeiða tilvitað við menning av sínum starvsfólkum. Øll kunnu læra at gerast ein góður coach.
**Tilmelding: áðrenn 18. apríl 2006**

**Broytingarleiðsla hold 1**
**24 tímar 8; 9; 10. mai 14; 15. juni kl. 09.00-16.00**
Nýtt Leiðslumenning skeið í broytingarleiðslu í praksis!
**Ein útbúgving fyri leiðarar, sum arbeiða við broytingum, og sum hava eitt ynski um at skilja og handfara allar partar eisini teir truplu av leiðslu av broytingarprosessum.**

Dentur verður lagdur á bæði at geva innlit í strategiskar fyrimyndir til fremjing av broytingarprosessum, og at økja um sálarfrøðisliga innlitið í teimum aftanfyriliggjandi sálarfrøðiligu prosessum, sum ofta verða aktiveraðar í samband við broytingar.
**Tilmelding: áðrenn 20. apríl 2006**

**Projektleiðaraútbúgving hold 8**
**48 tímar 25; 26. sept. 23; 24. okt. - 20; 21. nov. kl. 09.00-16.00**
Arbeiðir tú við projektum, ella ert tú projektleiðari, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Skift verður ímillum modul, sum vara 2 dagar og heimauppgávur, sum taka støði í tínum egnu projektum, og sum samantvinna teori og praktiskt arbeiði.
**Tilmelding: áðrenn 11. september 2006**

**Persónlig førleikamenning hold 2**
**24 tímar 2; 3. nov. og 11. des. kl. 09.00-16.00**
- Hevur tú skil á tínum egnu sterku síðum?
- Hevur tú eina mynd av, hvussu onnur uppliva teg?
- Sjálvsálit í tín virkisstíl og førleikar økir um tín møguleika at virka betur.

Skeiðið gevur tær eina mynd av tínum persónligu førleikum og hvørja atferð ein oftast velur - og íblástur, ítøkilig amboð og persónliga sparring til virkni og menning.
**Tilmelding: áðrenn 23. oktober 2006**

**Lesið meira um skeiðini á *www.skeidsdepilin.fo* ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

TEAM85

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeiðdsdepilin.fo